# Útberingin til útoyggjar steðgar

**Tað loysir seg ikki hjá Prentmiðstøðini at bera bløðini út á smáum plássum, og tí er útberingin til smáoyggjar steðgað. Seinni verður útberingin helst steðgað í fleiri økjum eisini**



*Nú hevur Prentmiðstøðini steðga útberingini av bløðunum á fleiri smáplássum. Hesa útbering hava bløðini røkt, síðani Postverkið gavst í apríl mánaði í 1999*

ÚTBERING
*Eyðun Klakstein*

Nú verða leygardagsútgávurnar av Sosialinum og Dimmalætting ikki longur bornar út til haldarar í Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Hesti og Skúvoy um vikuskiftið.

Prentmiðstøðin, sum hevur staðið fyri hesi útbering síðani Postverkið gavst við henni í apríl mánaði í 1999, er nú steðgað við útberingini.

Tað loysir seg ikki hjá Prentmiðstøðini at bera bløðini út á smáplássunum, og tí hevur felagið tikið avleiðingarnar av hesum.

– Vit hava verið í samráðingunum við Vinnumálastýrið um stuðul til útberingina, men nú málið dregur út, hava vit valt at steðga útberingini, sigur Hjalgrím Samuelsen, sum er nevndarformaður í Prentmiðstøðini. Hann er somuleiðis fíggjarstjóri á Dimmalætting.

Ætlanin var, at útberingin skuldi steðga 1. januar, men tá var gongd í málinum, og tí er útberingin nústaðni steðgað.

### Rætt at fáa bløðini sama dag

Fólk á útoyggj mugu tí venja seg til, at tey ikki fáa leygardagsútgávurnar av bløðunum fyrr enn eftir vikuskiftið.

Fyri fólk í Kalsoynni verður avleiðingin tann, at fólk fáa leygardagsblaðið týsdag – fýra dagar eftir at tað er skrivað og á gøtuni aðrastaðni.

– Posturin er ræstur, tá hann kemur í Kalsoynni, men hetta ger tað bara enn verri, sigur Markus í Norðnástovu, sum er borgarstjóri í Mikladals kommunu.

– Vit eru kedd um, at útberingin steðgar, og vit halda, at fólk á útoyggj hava sama rættin til at fáa bløðini á útgávudegnum, sum onnur í landinum hava tað, sigur hann.

Hann sigur seg ivast stórliga í, hvør fer at tíma at halda bløðini á útoyggj, tá tey fáa vikuskiftisblaðið fýra dagar eftir, at onnur fáa tað.

### Almenn uppgáva

Hjalgrím Samuelsen, nevndarformaður í Prentmiðstøðini, ásannar, at fólk á oyggjunum koma at merkja, at felagið steðgar við útberingini.

– Men hetta er ein samfelagstænasta, sum vit hava átikið okkum, síðani Postverkið gavst við henni í 1999. Tí er hetta í grundini ein tænastustøði, sum tað almenna hevur lagt. Hjá okkum loysir tað seg ikki at bera bløðini út sama kvøld á smáoyggjunum, og vit mugu hugsa um, hvat loysir seg, sigur hann.

– Vit hava roynt at fingið tað almenna at gjalda fyri útberingina til smáplássini, tí hetta meta vit sum eina almenna uppgávu, men málið bara dregur út.

### Postverkið og landsstýrið ábyrgdina

Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, vísir á, at tað eru ikki bløðini, sum steðga útberingini, men hinvegin Postverk Føroya.

– Postverkið gavst jú við útberingini leygardag í apríl 1999, og síðani hava bløðini átikið sær hesa útbering. Men vit mugu viðurkenna, at tað loysir seg ikki hjá okkum at bera út á smáu plássunum, sigur Jan Müller.

– Vit dríva forrætning, og tí mugu vit hugsa um, hvat loysir seg hjá okkum. Og um fólk á útoyggjunum eru kedd og ill um ikki at fáa leygardagsblaðið til vikuskiftið, so er adressan ikki bløðini, men Postverkið og landsstýrið.

Ábygdarblaðstjórin á Sosialinum vísir á, at aðrastaðni er vanligt, at almennu myndugleikarnir lata stuðul til útbering av bløðum.

– Um Postverkið ikki er ført fyri at bera bløðini út, so kunnu vit átaka okkum hesa uppgávuna, men so mugu vit eisini fáa stuðul frá tí almenna, sigur Jan Müller.

### Meira útbering í Havn

Tá postgjaldið hækkar 1. juli í ár, fer Prentmiðstøðin at kunna bera bløðini út hvørt kvøld í høvuðsstaðnum fyri sama prís sum Postverkið.

Tí útilokar nevndarformaðurin í Prentmiðstøðini ikki, at felagið framyvir fer at bera bløðini út í Havn hvørt kvøld.

– Sum frálíðir fara vit helst at steðga við útberingini á fleiri av smærru plássum, tí vit mugu hugsa um stóru økini, har tað loysir seg betri hjá okkum at bera bløðini út, sigur Hallgrím Samuelsen.

Sosialurin og Dimmalætting geva fimm bløð út um vikuna. Fýra av bløðunum ber Postverkið út, meðan leygardagsblaðið verður borið út av Prentmiðstøðini, sum bløðini sjálvi eiga.

# Trongligt á havnøkinum

**Býráðið í Klaksvík ásannar, at tað verður trongligt á vestara havnøki, tá nýggja krivjivirkið er bygt**



KLAKSVÍK
*Eyðun Klakstein*

Týskvøldið samtykti Klaksvíkar býráð prinsipielt byggiloyvi til nýtt kryvjivirki, sum alifyritøkurnar Faroe Salmon og East Salmon skulu byggja.

Men samstundis sum býráðslimirnir tóku undir við ætlanini hjá alifyritøkunum og játtaðu byggiloyvi, ásannaðu teir, at tað verður trongligt á økinum fram yvir.

– Vit mugu leggja greiðan politikk fyri havnina og hvussu hon skal útbyggjast. Hetta eru vit nú farin í holt við, segði Torleif Sigurðsson úr Javnaðarflokkinum, sum er nýggi formaðurin í havnanevndini, tá málið var fyri á býráðsfundi týskvøldið.

– Tað verður eitt øðiligt trýst á havnaøkið í Klaksvík, og tí hevur hetta málið skund, segði Kristian Fríðrik Olsen úr Fólkaflokkinum, sum var formaður í havnanevndini fram til ársskiftið.

### Nýggja góðshavn

Fleiri møguleikar eru fyri at loysa plásstrupulleikarnar á havnalagnum í Klaksvík.

Ein møguleiki er at fylla meiri út norðureftir á vestara kaiøkinum. Ein annar møguleiki er at byggja út aðrastaðni.

– Íløgujáttanin til havnina hevur staðið í stað í nógv ár, og vit renna okkum altíð í íløguloft. Men hetta er ein prioriteringsspurningur, og tí eiga vit helst at prioritera havaøkið meira framyvir, segði Hilmar Danielsen úr Kristiliga Fólkaflokkinum, sum er limur í havnanevndini, á býráðsfundinum týskvøldið.

Hann helt tað hava skund at gera meira við nýggja góðshavnina í Ánunum.

Karl Heri Joensen úr Sjálvstýrisflokkinum, sum er nýggjur formaður í Teknisku nevnd, vísti á, at helst fer virksemið á vestara kaiøkini at vaksa enn meiri í framtíðini, og tí verður neyðugt at gera eitthvørt har.



# Sosialurin letur upp redaktión í Norðoyggjum

**Í dag letur Sosialurin upp sjálvstøðuga blaðredaktión í Klaksvík. Almenn móttøka verður í hølunum í Nólsoyar Pálsgøtu 1 klokkan 16**

LOKALREDAKTIÓN
*Edvard Joensen*



*Arbeitt verður at innrætta fyrstu sjálvstøðugu lokalredaktiónina hjá føroyskari ávís, her hana hjá Sosialinum í Norðoyggjum*

Í dag letur Sosialurin upp sjálvstøðuga redaktión, Norðoyardeild, í Klaksvík. Í hesum sambandi hevur blaðið leigað høli frá Karl Nielsen, í Nólsoyar Pálsgøtu, í bygninginum, har Eiler Foto helt til. Skrivstovuhølini eru í ovaru hæddini, út móti vágni.

Endamálið við hesi nýggju deildini í Norðoyggjum er at koma meira víða kring landið og at gera blaðið meira sjónligt uttan fyri miðsteðarøkið. Sosialurin hevur annars havt blaðfólk í Klaksvík í eina tíð, men nú verður so lagt veruligt grundarlag undir eina sjálvstøðuga redaktión, sum burturav fer at hava til uppgávu at røkja tíðindaflutningin úr Norðoyggjum. Í tann mun tað ber til fer redaktiónin eisini at dekka part av Eysturoynni.

Jan Müller, blaðstjóri á Sosialinum sigur, at teir leingi hava arbeitt við hesum ætlanum. Nú tøknifrøðin er so framkomin er tíðin komin til gera ætlanina til veruleika. Í hesum sambandi hevur blaðið eisini innrættað seg væl og fingið til vega ta mest nýtímans útgerðina, tað veri seg teldur, internet, digital fototól, fax osfr.

Í fyrsta umfari verða tað fólk frá redaktiónini á Argjum, sum fara at taka sær av deildini í Norðoyggjum, men ætlanin er so við og við at fáa fólk á staðnum við í arbeiðið á redaktiónini. Ætlanin er so eisini, at íbúgvar í Norðoyggjum kunnu koma á skrivstovuna í Nólsoyar Pálsgøtu í ørindum eitt nú við lesarabrøvum, viðmerkingum, greinum, heilsanum, lýsingum og hvat tað nú skal vera.

Blaðstjórin á Sosialinum sigur, at teir við hesi roynd ikki hava nakað ynski um at koppa lokalblaðnum hjá Norðingum, Norðlýsinum. –Tað blaðið hevur djúpar røtur har norðuri og fer altíð at vera veruliga lokalblaðið hjá norðingum. Pláss eigur tó at vera fyri Sosialinum, sum eisini fer at røkja aðrar uppgávur enn Norðlýsið tekur sær av. At vit koma út fimm ferðir um vikuna ger so eisini støðuna hjá bløðunum ymiska sigur Jan Müller, sum vónar, at henda nýggja royndin verður væl móttikin av øllum norðingum.

- Vit hava nú í fleiri ár havt blaðfólk, sum hevur arbeitt í Suðuroynni burturav. Áki Bertholdsen hevur við arbeiði sínum á skrivstovuni í Sandvík víst, hvussu stóran týdning tað hevur fyri eitt blað at hava fólk á staðnum. Nú fara vit so eitt stig víðari og byggja upp eina heilt sjálvstøðuga redaktión í einum øki av landinum sigur blaðstjórin á Sosialinum, sum ikki dylur fyri, at hetta er alt ein partur av eini framtíðar strategi hjá blaðnum at liva upp til skylduna at vera bæði eitt landsblað og eitt lokalblað sigur blaðstjórin og heldur fram:

- Soleiðis sum umstøðurnar eru í Føroyum, eru vit sum blað tvingað til bæði at vera eitt landsblað og eitt lokalblað um somu tíð. Hetta er ein stór avbjóðing og setir stór krøv til starvsfólkið. Og fyri at liva upp til skylduna at vera eitt lokalblað fyri øll øki uttan fyri miðsteðarøkið eisini, so eru vit noydd til eisini at arbeiða út frá lokaløkinum sjálvum sigur Jan Müller, sum samtíðis vísir á, at fyri tey økini, har lokalredaktiónir ikki verða settar á stovn, har verða heimildarfólk og rullandi redaktiónin hjá blaðnum framhaldandi at hava ein týðandi leiklut.

### Ikki av tilvild

Jan Müller vísir annars á, at tað er ikki av tilvild, at man hevur valt Norðoyggjar til hesa fyrstu veruliga redaktiónina. Fyri tað fyrsta er Klaksvík næststørsti býurin í landinum. Harnæst eru Norðoyggjar eitt av okkara mest týðandi fiskivinnuøkjum. – Vit fjølmiðlafólk eiga at taka í egnan barm og viðganga, at høvuðsvinnan fær ikki altíð tann dekning hon hevur uppiborið. Fyri at bøta um hetta og í størri mun seta fokus á fiskivinnu á sjógvi og á landi fara vit at at hava fasta redaktión í Klaksvík. Ein av høvuðsuppgávunum hjá henni verður at fylgja arbeiðinum hjá teimum fólkum, sum virka í fiskiflotanum, á virkjum á landi og eisini í alivinnuni, sum er vorðin ein týðandi táttur í búskapinum.

Sosialurin fer tó eisini at viðgera øll onnur hugsandi mál, sum hava við Klaksvíkina og bygdirnar norðan fyri at gera. Blaðstjórin dylur heldur ikki fyri, at nýggja redaktiónin eisini verður sett á stovn fyri at liva upp til ynskini hjá føroyingum flest, um at gerandisdagurin og viðurskiftini hjá fólki úti kring oyggjarnar hava eins stóran týdning fyri hetta land sum tey hjá íbúgvunum í miðsteðarøkinum.

Almenn móttøka er í hølunum í Nólsoyar Pálsgøtu fríggjadagin klokkan 16.

Telefonin hjá Norðoyarredaktiónini er 458686 og faksið er 458687. Telduposturin er klaksvik@sosialurin.fo



*Redaktiónin hjá Sosialinum í Norðoyggjum fer at halda til í hølum í Nólsoyar Pálsgøtu*

